# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara høgt elskaða mamma, vermamma,
omma og langomma

**Bergithe Andreasen**
vanliga nevnd Gitta
við Sjógv, á Strondum

andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi
leygardagin 14. mars, 92 ára gomul.
Farið verður av Røktarheiminum týsdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju
mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Johanna, Vilhelm og Regin**

Tey, ið vilja minnast Gittu, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og ellisheimi eina peningagávu.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Sigurd Danielsen**
Sandi

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Sands kirkju.
Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Turið, Ásla, Tóra, Ólvuva,**
**Jón og Sunnuvá við familju**

## Tøkk

Vit takka øllum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Brynjálvur Djurhuus**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

*Fyri tey avvarðandi*
**Begga, Bergur, Majken og Lilian**

**Dagurin**
**16. mars. Gudmundur**, deyður í 1237. Biskupur á Hólum í Íslandi. Fyri undirgerðir, sum hendu við grøv hansara, varð hann skírdur halgimenni. Norrønt navn, ið merkir Guð og verndari.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Kirkjufólkið heiðraði Hjørleifi



*Hjørleif Waag Høgnesen hevur verið urguleikari í Christianskirkjuni í 40 ár*



*Hjørleif Waag Høgnesen og sonurin Leif*

**Familjuguðstænastan í Christianskirkjuni í Klaksvík sunnudagin var eisini ein hátíðarguðstænasta fyri Hjørleifi Waag Høgnesen, sum hevur verið urguleikari har í 40 ár**

Sunnudagin 15. mars var familjuguðstænasta í Christianskirkjuni í Klaksvík. Ymiskt var á skránni hendan dagin, eitt nú sang barnakórið í KFUM og K. Eisini var nógvur felagssangur og Hanus Simonsen, prestur, helt eina barnavinarliga prædiku.

Talan var samstundis um eina hátíðarguðstænastu, við tað at liðin eru 40 ár síðani Hjørleif Waag Høgnesen byrjaði sum urguleikari í Christianskirkjuni. Hann avloysti tá Fridu Petersen.

Í hesum sambandi sigur Kirkjuráðið í Klaksvík í tíðindaskrivi, at Hjørleif hevur røkt hetta starv væl nú í 40 ár. Hann er álítandi og hjálpsamur, og tá ið heitt verður á hann, er hann sera beinasamur. Hann er ein góður urguleikari, sum vit kirkjufólk í Klaksvík hava notið gott av. Hann leiðir sálmasangin væl, verður sagt í tíðindaskrivi frá Kirkjuráðnum, sum ynskir Hjørleifi tillukku og Guds signing.

Eftir prædikuna sunnudagin spældi Hjørleif, meðan sonurin, Leif, sang sálmin „Guð ger meg til eitt lítið ljós". Hetta var sera væl sungið og spælt. Tá guðstænastan var liðug, var hugnaløta í kirkjukjallaranum, har fleiri nýttu høvið at heilsa upp á Hjørleif. Talur vórðu hildnar av Jørgini Ellingsgaard, formanni í kirkjuráðnum, Hanusi Simonsen, presti, og Ólavi í Mittúni, sum hevur sitið í kirkjuráðnum í mong ár. Ólavur takkaði Hjørleifi fyri at hann í so mong ár hevur lagt lív og sál í at leiða sálmasangin og lovsangin í kirkjuni. Hjørleif fekk ein málning frá kirkjuráðnum, sum listakvinnan Lydia Petersen í Klaksvík hevur málað.

*mg*



*Hjørleif fekk ein málning frá kirkjuráðnum*



*Hjúnini Tórgerð og Hjørleif Waag Høgnesen*